# Ónøgd við broyttu sveinabrøvini

*Bæði innan vinnuna og í almennu umsitingini hevur ónøgd verið um nýggju sveinabrøvini, men broytingar eru á veg, verður sagt av Undirvísingar- og Mentamálastýrinum*

STEFAN Í SKORINI

Tá Føroya Lærupráð fór í søguna fyri einum ári síðani eftir bygnaðarbroytingarnar, vórðu uppgávurnar hjá ráðnum býttar út til onnur í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum. Tað eru yrkisútbúgvingarráðið og yrkisnevndirnar, sum nú taka sær av uppgávunum hjá læruráðnum. Samstundis kom ein nýggj lóg um yrkisútbúgvingar í gildi, sum avloysti ta gomlu lærlingalógina.

Síðani er tað gamla sveinabrævið avloyst av einum yrkisprógvi, sum í grundini er tað sama, men fleiri hava víst sína ónøgd við tað nýggja yrkisprógvið.

Tað gamla sveinabrævið líktist meira teimum, sum eru í útlondum og varð útgreinað á fleiri fremmandamálum, so at eingin trupulleiki var hjá einum útlærdum at søkja arbeiði uttanlands.

Í tí nýggja yrkispróvnum er bæði útsjóndin og innihaldið broytt frá tí gamla sveinabrævinum. Tað nýggja yrkisprógvið er bara eitt vanligt pappír, meðan tað gamla sveinabrævið var minni og hevði stíva permu. Heldur ikki er tað nýggja útgreinað á fleiri málum, men bara á føroyskum.

Í vinnuni vóru fleiri lærumeistarar ónøgdir bæði við tað nýggju útsjóndina, sum ikki vísti nóg væl, at talan var um eina 4 ára langa útbúgving, og eisini varð hildið, at tað var sera óheppið, at yrkisprógvið bara varð skrivað á føroyskum. Hetta kann geva einum útlærdum trupulleikar, um hann hevur ætlanir um at søkja arbeiði uttanlands, tí eingin skilir prógvið.

Á Undirvísingar- og Mentamálastýrinum hava tey eisini fingið fleiri klagur um tær broytingar, sum eru framdar.

**Broytingar eru á veg**

Tað vísir seg nú, at tey, sum hava ábyrgdina á hesum økinum, hava tikið klagurnar til eftirtektar, tí nú hevur yrkisútbúgvingarráðið ætlanir um broytingar, so at yrkisprógvið fer at líkjast meira tí gamla sveinabrævinum.

Bæði Petur Oluf Hansen, skrivari í yrkisútbúgvingarráðnum, og Erhard Jacobsen úr yrkisnevndunum, har bæði umboð fyri arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar eru, siga, at yrkisprógvið stendur fyri nøkrum broytingum.

Teir eru á einum máli um, at hetta ikki er nakar stórur trupulleiki, men at hetta bara eru nakrar smáar tekniskar rættingar, sum skulu fremjast.

Erhard Jacobsen sigur eisini, at um ein útlærdur skal søkja um arbeiði uttanlands, so skal hann, sum nú er, venda sær til Undirvísingar- og Mentamálastýrið og biðja um at fáa eina útgreinan av próvnum á øðrum máli.

Erhard Jacobsen sigur seg harmast, um nakar hevur havt trupulleikar við sínum yrkisprógvi uttanlands, men hann sigur eisini, at eingin orsøk er at renna seg í trupulleikar viðvíkjandi málinum á yrkispróvnum, tí tað er bara at venda sær til teir um hjálp.

Henda skipanin, við at ein útlærdur skal biðja um at fáa prógvið á einum øðrum máli, er tó ikki tann besta.

Hann hevur ikki hoyrt, at tey, sum hava fingið eina útgreinan av sínum yrkisprógvi, hava havt nakrar trupulleikar uttanlands, tá tey skulu søkja arbeiði.

Erhard Jacobsen sigur, at eisini er ætlanin at broyta útsjóndina av yrkispróvnum, tí yrkisprógvið skal vísa, at henda 4 ára langa útbúgvingin er nakað serligt.

Enn er ikki endaliga avgjørt, hvørjar og hvussu broytingarnar verða, men tað kemur fyri fyrst í september.

# Flogførini fáa nýggjan lit

*Enn er ikki endaliga avgjørt, hvussu nýggi liturin verður, men ætlanir eru um at broyta litin á tí gamla flogfarinum nú tað skal til C-eftirlit*



ÓLAVUR Í BEITI

Summarflúgvingin hjá Atlantic Airways er so smátt farin at halla og higartil hevur øking verið á so at siga øllum rutunum hjá felagnum.

Føroyska flogfelagið gavst at flúgva til Glasgow tann 19. august, og tann 25. august gevst flogfelagið at flúgva til Stavanger.

Allan oktober verður flogið til Aberdeen og charterflúgvingin til Narssuaq endar 9. september.

Tann 28. august skal so tað gamla flogfarið hjá Atlantic Airways til C-eftirlit í Woodford, uttan fyri Manchester, og eftir hetta eftirlit verður flogfarið so málað.

**Sama lit ella nýggjan**

Atlantic Airways hevur umhugsað at fáa flogførunum báðum sama lit, men endalig støða er ikki enn tikin til, hvør hann verður. Hetta verður so í hvussu er greitt, tá ið gamla flogfarið kemur aftur frá eftirlitinum í Woodford tann 13. september.

Atlantic Airways arbeiðir eisini við onkrum møguleikum í sambandi við nýggja flogfarið. Roynt verður í løtuni at leiga flogfarið út, men tað kann eisini hugsast at Atlantic Airways kemur at brúka flogfarið í egnari flúgving.


# ÚTSØLA

**Natura** 50 gr. fyrr 24⁵⁰ NÚ 15⁰⁰

**Lama** 50 gr. fyrr 29⁷⁵ NÚ 15⁰⁰

**Orkide** 50 gr. fyrr 29⁷⁵ NÚ 15⁰⁰

**PT 2** 50 gr. fyrr 21⁰⁰ NÚ 15⁰⁰



Sosialurin - 311820

**Flame** 50 gr. fyrr 15⁰⁰ NÚ 6⁰⁰

**Arwetta** fyrr 25⁰⁰ NÚ 15⁰⁰

**Hauswoll** fyrr 34⁷⁵ NÚ 20⁰⁰

**Øko. natúr tógv** NÚ 10⁰⁰

**Eitt úrval av troyggjum ÷20%**



Tógvhandilin IGLOO
Sverrisgøta 19
Tórshavn
Tel. 315264 Fax 319623

Bygdarordrar verða eisini avgreiddir


# Vælskapt tiltak

*30. september verður endabresturin á tiltakinum »Vælskapt brek«. Tá verður fløga givin út við bestu løgunum frá lagsmiðjakappingini, konsert verður í Norðurlandahúsinum, og pallborðsfundur verður hildin um umstøðurnar hjá brekaðum*

RÚNAR REISTRUP

Tiltakið »Vælskapt brek« sum ein áhugabólkur hevur tikið stig til til tess at skapa eina betri fatan av umstøðum hjá brekaðum og teirra avvarðani, var í gjár evni á einum tíðindafundi, har sagt varð frá endabrestinum á tiltakinum.

Í vár varð ein lagsmiðjakapping fyriskipað í sambandi við tiltakið. Nærum 80 løg komu inn til kappingina, sum tey trý, Lena og Leif Andresen og Niklas Johannesen vunnu.

**Ger fløgu**

í løtuni arbeiðir Jóhannus á Rógvu Joensen við at taka upp og ljóðblanda umleið 20 av løgunum, ið komu inn til kappingina.

Hesi verða givin út á fløgu 30. september, ið eisini gerst eitt slag av endabresti á tiltakinum.

Hendan dagin verður nevniliga eisini ein pallborðsfundur og ein konsert fyriskipað sum partur av tiltakinum »Vælskapt brek«.

Konsertin verður við nøvnum frá fløguni, og á pallborðsfundinum fara fólk at sita, ið hava heimild at føra góð hugskot út í politiska lívið. Soleiðis ætla fyrireikararnir at tryggja seg ímóti, at fundurin bara verður tos uttan praktiskar avleiðingar.

**Koyristólapláss á konsertini**

Bæði pallborðsfundurin og konsertin verða í Norðurlandahúsinum 30. september ávikavist klokkan 15.00 og 19.30.

Atgongumerkjasølan til konsertina byrjaði longu í gjár. Áhoyraraplássini til hesa konsertina verða ikki so nógv í tali, sum vanligt er til konsertir í Norðurlandahúsinum. Hetta kemst av at hesaferð verða stólarekkjur tiknar burtur fyri at geva betri pláss til koyristólar.

Fólk, ið hava brúk fyri at hava hjálpara við sær, fáa hendan ókeypis inn við til konsertina, og MBF bussurin syrgir fyri at tey, ið vegna kropslig brek hava torført við at fara í Norðurlandahúsið, kortini koma vegin fram, um tey ynskja tað.

Á internetsíðuni http://sangkapping.cbj.net ber til at fylgja við hvat hendir innan tiltakið »Vælskapt brek«.



# Brúk fyri pengunum

*Norski forsætismálaráðharrin Jens Stoltenberg segði í fyrilestri sínum, at norðmenn ikki kundi verið útlendska kapitalin fyriuttan, tá oljuvinnan bleiv rist upp á føtur*

DIA MIDJORD,
STAVANGER

Noreg er ein av stóru veitarunum til altjóða orkuídnaðin, sum 7. størsti framleiðari og 3. størsti útflytari av olju.

– Fyri 100 árum síðani var Noreg eitt fátækt land. Farna øldin er søgan um, hvussu vit arbeiddu okkum burtur úr vesaladóminum, segði norski forsætismálaráðharrin Jens Stoltenberg, ið var fyrsti røðarin á ONS-stevnuni.



*Jens Stoltenberg, forsætismálaráðharri*

Hann legði dent á, at Noregi undir ongum umstøðum kundi havt bygt upp eina so sterka vinnu, um ikki útlendskur kapitalur var við frá byrjan.

– Útlendsku pengarnir, vitanin og ráðgevingin vóru neyðug. Men vit syrgdu eisini alla tíðina fyri at hava eiftirlit við og tryggja eigaraviðurskiftini yvir okkara oljutilfeingi, segði Stoltenberg.

**Styrkir Statoil**

Verður tað upp til Jens Stoltenberg, skal norska landsoljufelagið Statoil partvís privatiserast.

– Eg meti tað styrkir um Statoil, sleppa privatir eigarar upp í part. Men samstundis haldi eg, at landið skal eiga meirilutan í oljufelagnum.

Jens Stoltenberg nevndi eisini á pressufundi seinni á degnum, at eitt nýtt felag skal stovnast. Hetta felag skal eiga Statoil og SDØE (Statens direkte økonomiske engagement, sum umsitur tær útvið 300 mia. hjá norska statinum).

– Hetta tryggjar okkum, at vit fáa sum frægast burtur úr avlopinum, segði hann.

**Vit kunnu gera nakað**

Jens Stoltenberg vísti á í røðu síni, at tað er umráðandi hjá stórum olju-fyritøkum at vísa ábyrgd fyri heilsu, umhvørvi og trygdini, tá tey skulu menna orkuna í einum fremmandum landi.

Eisini nevndi hann, at seks børn doyggja í heiminum um minuttin, tí tey ikki eru vaksinerað.

– Er tað nakar sum kann pynta upp á hesi ræðandi tøl, so eru tað sterk oljulond sum eitt nú Noregi, segði Jens Stoltenber og legði aftrat, at norska stjórnin komandi 5 árini hevur sett eina milliard krónur av í hesum sambandi.



*Her verður stóra framsýningin ONS hildin*

# Flogvøllurin riggar seg til oljuvirksemi

JAN MÜLLER,
STAVANGER

Millum føroysku luttakararnar á altjóða oljumessuni í Aberdeen eru eisini umboð fyri Flogvøllin í Vágum, sum nú av álvara er farin at brynja seg út til komandi oljuleiting við Føroyar. Finnbogi Niclassen, stjóri sigur, at teir eru við at fyrireika samskiftið millum komandi oljuleitipallar og skip og Føroyar. VHF-radio verður sett upp í Akrabyrgi, soleiðis at man kann dekka samskiftið við helikoptarum úr Føroyum og heilt suður á leitiøkini. Ætlanin er at testflúgva radiotólini í februar komandi ár. Eisini verður arbeitt við at fáa luftrúmið á føroyskum øki stýrt úr Vágum. Tað merkir, at í tí hæddini, sum helikoptararnir koma at flúgva tvs. undir 7500 fót kemur flogvøllurin at hava ræðið.

Finnbogi Niclassen sigur, at teir fara at hava alt hetta klárt til juni-juli mánað næsta ár, tá leitingin kann byrja. Helst fara einar tvær stórar superpumu tyrlur at hava støð á flogvøllinum, tá leitingin byrjar. Onnur verður til at flyta fólk til og frá, meðan hin verður at standa klár til bjarging.

Flogvallarstjórin veit enn ikki, hvørjar tylur og hvørji feløg fara at gera seg galdandi, men bæði Flogfelag Føroya og Atlantsflog liggja framvið.



*Finnbogi Niclassen*


